# Jólamaður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði



*Í kvøld verður stórt jólatiltak í Mentanarhúsinum í Fuglafirði*

JÓLATILTAK
*Vilmund Jacobsen*

Í kvøld kl. 19 verður eitt fjølbroytt og áhugavert tiltak í Mentanarhúsinum í Fuglafirði við felagssangi, sjónleiki, jólatræi og jólamanni.

Kvøldið byrjar við felagssangi, har Jan Rúni spælir guitar, og Lív og Nicolina syngja fyri. Hugsandi er, at onkur situr við klaverið, meðan sungið verður.

Sjónleikur verður eisini á skránni, og meðan leikurin verður framførdur, spælir Jan Rúni guitar.

### Jólamaður kemur

Síðan verður dansað um jólatræið, og tá ið tíðin gongur, kemur jólamaður uppí ringin.

Tá ið liðugt er at dansa og syngja jólasangir, fara jólamaður, vættrar og onnur at býta út bomm og sodavatn.

Í Mentanarhúsinum hava fólk eisini høvi at keypa sær kaffi og eplaskivur.

# Eingin Røkke hesaferð

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Herfyri ljóðaði, at norski ríkmaðurin, Kjeld Inge Røkke, ið er tengdur at felagnum, sum eigur Næraberg, skuldi koma higar til lands at vitja umborð á Nærabergi, nú skipið verður í havn til 2. januar.

Áðrenn Næraberg kom á Klaksvík tíðliga týsmorgunin, hevði manningin vaskað skipið bæði uppi og niðri.

Vit spurdu tí á JFK-Troli, um nakað var í tíðindunum um vitjanina hjá Røkke.

- Tað verður nokk ikki á hesum sinni, at hann kemur higar til lands, men ivaleyst verður tað einaferð, siga tey á JFK-Troli.

Tá ið eitt verksmiðjuskip, sum annars er í vinnu, verður lagt nakrar vikur, er neyðugt undir øllum umstøðum at vaskað verksmiðjuna, har fiskurin verður arbeiddur, ógvuliga væl.

- So, hetta arbeiði skuldi gerast kortini, sigur JFK-Trol.

# Næraberg komin aftur av túri



*Verksmiðjutrolarin, Næraberg, kom aftur av túri tíðliga týsmorgunin við umleið 600 tonsum av surimi og góðum 200 tonsum av mjøli.*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

**Ætlanin er at fara nýggjan túr aftur, 2. januar**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tíðliga týsmorgunin kom verksmiðjutrolarin, Næraberg, aftur av túri, sum upprunaliga byrjaði, 17. oktober.

Síðan túrurin byrjaði, hevur skipið tvær ferðir verið inni og bunkrað; fyrru ferð í Klaksvík og seinnu ferð í Fuglafirði.

Fyrri parturin av túrinum, áðrenn bunkringina í Klaksvík, var fiskiskapurin slakari, og svartkjafturin verri, men tá ið teir fóru útaftur, fekst meira burtur úr.

Í samrøðu við Sosialin herfyri, segði skiparin, sum fór í land, tá ið teir bukraðu á Fuglafirði, at seinni parturin av túrinum hevði hildnast betur.

### Væl at fáa

Í Fuglafirði kom Mannbjørn í Grund umborð sum skipari, og sum skilst, hevur væl verið at fingið, til teir nú góvust at fiska.

Nú Næraberg kom aftur, hevði skipið umleið 600 tons av surimi og góð 200 tons av mjøli.

Ætlandi fer Næraberg nýggjan túr, 2. januar.

Manningin á risatrolaranum telir umleið 80 fólk á hvørjum túri.

# Fegnast um Vargin

TÍÐINDASKRIV
*Restorffs*

Á Restorffs eru eru tey fegin um ta góðu móttøku, sum teirra nýggja øl, Vargur, hevur fingið.

– Sølan hevur gingið væl, og tá henda vikan er komin at enda, er øll framleiðslan, 65.000 fløskur væntandi farin, sigur bryggjaríið í tíðindaskrivi.

– Reaktiónirnar hjá kundum hava verið positivar. Ølurin, gjørdur av Munchener Malti, er vælsmakkandi og sniðið við úlvinum og Óðføra frá norrønnu gudalæruni hevur vakt stóran áhuga manna millum.

Restorff letur eisni væl at søluni av teirra Jólabryggi og sjálvandi Pilsnarinum og Gullølinum sum er á flestu jólaborðum hesa tíðina.

Næsta nýggja øl- framleiðsla frá Restorff verður til várs, tá ein lættur Várpilsnari kemur á marknaðin. Onki navn er enn funnið til henda øl, so navnauppskot og viðmerkingar eru sera vælkomin.

Annars kemur Restorff skjótt við einum nýggjum Cola á marknaðin. Bryggjaríið vil fegið koma í samband við nakrar skúlaflokkar kring landið, sum hava hug at verða royndar-smakkarar.



UTTAN ÚR HEIMI

# Fordómar reka danir úr Grønlandi

**Danir siga seg vera fyri veksandi ágangi í Grønlandi, og tað fær nú fleiri til at fara aftur til Danmarkar**

GRØNLAND
*Árni Joensen*

- Slepp tær til Danmarkar tín býtti dani.

Hetta orðalagið er vorðið meiri vanligt í Grønlandi seinastu tíðina, siga danir, sum búgva og arbeiða í Grønlandi.

Og tað hevur fingið summ ar teirra til at rýma haðani. Eitt nú Jesper Skovgaard, sum seinastu 14 mánaðarnar hevur arbeitt á grønlendsku hagstovuni. Hann sigur við Berlingske Tidende, at hann hevur valt at fara heimaftur orsakað av tí, sum hann kallar veksandi rasismu millum alt fleiri og fleiri grønlendingar.

Sambært dønum, sum eru kønir í grønlendskum viðurskiftum, eru danir vorðnir minni og minni umtóktir í Grønlandi tey seinastu fimm árini.

Lise Lyck, lektari á handilsháskúlanum í Keypmannahavn, sigur við Berlingske Tidende, at tann politiska kósin, sum vinnur fram í Grønlandi í løtuni, er m. a. grundað á at skapa andstøðu ímóti tí, sum er danskt. Hon heldur, at hetta fer serliga at gera seg galdandi, tá tað snýr seg um málið, samleikan og hugsanina um Danmark og danir.

Anders Nilsson, sum er dani, og sum fyrr hevur verið limur í grønlendska Landstinginum, flutti aftur til Danmarkar fyri tveimum árum síðani eftir at hava búð í Grønlandi í 25 ár. Við Berlingske Tidende sigur hann, at danir í Grønlandi eru fyri veksandi rasismu í gerandisdegnum, á arbeiðsplássinum og í skúlanum.

- Nú eru danir við at troyttast av hesum, og so rýma teir úr Grønlandi, sigur Anders Nilsson.

# Kend mótmæla kríggi

**Meiri enn hundrað kendir amerikanarar hava skrivað undir eitt mótmæli ímóti ætlanini um kríggj við Irak**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*

Tað eru ikki bert amerikanskir andstøðupolitikarar, sum ivast í ætlanini hjá George W. Bush, forseta at leypa á Irak.

Nú hava meiri enn hundrað kendir amerikanarar skrivað undir eitt mótmæli ímóti ætlan forsetans. Millum teirra, sum hava skrivað undir mótmælisskrivið, eru Hollywood-stjørnurnar Kim Basinger, Matt Damon, Ethan Hawke, Samuel L. Jackson, Uma Thurman, Martin Sheen og Jessica Lange.

Eisini fyrrverandi admiralurin Eugene Carroll og fyrrverandi amerikanski sendiharrin í Irak, Edward Peck, hava skrivað undir mótmælið.



*Tað er ikki bara í USA, at fólk mótmæla ætlanini at leypa á Irak. Her mótmæla fólk í suðurkoreanska høvuðsstaðnum Seul amerikansku álopsætlanini*

*Mynd: Reuters*

Mótmælisskrivið varð almannakunngjørt á einum tíðindafundi í gjár. Tað er ein felagsskapur ímóti kríggi, sum stendur fyri tiltakinum, Á odda fyri felagsskapinum standa filmsleikararnir Anjelica Huston og Mike Farrell.

# Irakar avdúka ólógligar vápnahandilsmenn

**Í frágreiðingini, sum Irak hevur latið ST, eru eisini upplýsingar um útlendskar fyritøkur, sum hava selt landinum vápn**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*

Tað hevur vakt ans, at irakar nú kunngera, hvaðani teir hava fingið vápnini, sum teir hava kunnað keypt úr øðrum londum, sjálvt um ST hevur bannað allari vápnasølu til Irak.

Eygleiðarar siga, at hetta kann koma fleiri londum illa við - eisini londum, sum sita í trygdarráðnum hjá ST.

Higartil hevur trygdarráðið bert almannakunngjørt innihaldsyvirlitið í iraksku frágreiðingini, og har eru eingi nøvn á fyritøkum, sum hava selt teimum vápn. Diplomatiskar keldur á ST-høvuðsborgini í New York ivast kortini ikki í, at fyritøkurnar og londini eru nevnd við navni í sjálvari frágreiðingini.

## Illveður í Brasil

Gloprarregn, stormur og skriðulop hava kostað minst 34 mannalív í Brasil síðani vikuskiftið. Í býnum Angra dos Reis sunnan fyri Rio de Janeiro eru 40 fólk horevin í einum stórum skriðulopi, og sambært myndugleikunum eru smáar vónir um at finna nakran aftur á lívi.

Brasilska veðurtænastan sigur, at tað hevur regnað óvanliga illa á leiðini. Mánadagin varð avfallið mált til 129 millimetrar eftir einum samdøgri, og tað er meiri enn ein triðingur av tí vanliga árliga avfallinum har um vegir.

Angra dos Reis er eitt nógv avhildið frítíðarstað. Har eru 365 smáar oyggjar og umleið 2.000 baðistrendur. Nú sleppur eingin hagar, tí myndugleikarnir hava lýst økið vanlukkuøki.

## Sleppur undan sak

Amerikanska stjórnin vann ein týðandi løgfrøðiligan sigur mánadagin, tá ein dómstólur gjørdi av at vísa burtur einum máli, sum grannskoðanarskrivstovan hjá kongressini hevði lagt ímóti Dick Cheney, varaforseta.

Grannskoðanardeildin hjá kongressini kravdi, at Dick Cheney skuldi greiða frá, hvørjar fyritøkur stjórnin hevði ráðført seg við, áðrenn stjórnin legði sín orkupolitikk til rættis. Umhvørvisfólk og onnur hava leingi kravt, at varaforsetin skal upplýsa, hvønn hann ráðførdi seg við, men stjórnin hevur alla tíðina sýtt fyri at siga tað.

Hetta er fyrstu ferð, at grannskoðanardeildin hjá kongressini hevur lagt eina tílíka sak ímóti einari sitandi stjórn, men sambært dómaranum kann deildin ikki krevja at fáa tær upplýsingar, sum hon vil hava.

## Tríggir tiknir

Franska løgreglan hevur tikið tríggjar menn, sum eru undir illgruna fyri at hava havt ætlanir um at søkja at amerikanskum málum í Fraklandi.

Franska løgreglan sigur, at teir tríggir menninir eru limir í einum bólki, sum Djamel Beghal stendur á odda fyri. Hesin Djamel Beghal situr í fongsli í Fraklandi, eftir at hann varð tikin í Sameindu Arabisku Emiratunum og útflýggjaður. Í fongslinum hevur hann greitt frá, at bólkur hansara skuldi søkja at amerikansku sendistovuni í París. Hetta hevði við sær, at fleiri aðrir limir í bólkinum vórðu tiknir ymsastaðni í Evropa. Fýra teirra vórðu tiknir í Niðurlondum og koma fyri rættin har fyrsta dagin.

Løgreglan í Fraklandi sigur, at ein av teimum fýra, sum vórðu tiknir mánadagin, er ein telduserfrøðingur, sum rýmdi úr Bretlandi í fjør, tá bretska løgreglan leitaði eftir honum.

## Gamli Bush uppkallaður

Ein flogberi, sum amerikanski herflotin letur byggja á einari skipasmiðju í Newport News í statinum Virginia, hevur fingið navn eftir fyrrverandi forsetanum George Bush, sum er faðir núverandi forsetan.

USS "George H. W. Bush" verður ikki liðugt at taka í nýtslu fyrr enn í 2009. Skipið er 97.000 tons stórt og verður tann størsti flogberin í amerikanska herflotanum.

Tann 79 ára gamli fyrrverandi forsetin segði á einum hátíðarhaldi í Pentagon, at hann kendi seg ikki sum nakra hetju. Sjálvur sigldi hann við herflotanum undir seinna heimsbardaga. Seinni gjørdist hann flogskipari í herflotanum, men varð skotin niður yvir Kyrrahavinum. Tað eydnaðist honum at leypa út í fallskíggja.